# Eyka fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 2. desember 2015

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Niels Olaf Eyvindsson, ið møtti fyri Jóhan Eli Poulsen.

Fundurin varð settur kl. 17.30.

1. **Onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2016.**
   Samlaða fíggjarætlanin fyri 2016 er kr. 35.648.000,-. Útreiðslurnar til rakstur eru kr. 23.848.000,-, harav útreiðslur til eldraøkið eru mettar til kr. 7.650.000,-. Inntøkurnar eru mettar til íalt kr. 27.138.000,-, harav inntøkur í sambandi við eldraøkið eru ásettar til kr. 7.308.000,-. Útreiðslurnar til løgur eru kr. 11.800.000,-, har tann størsta løgan er bygging av dagstovni kr. 8.500.000,-. Skattaprosentið verður framvegis 20% og barnafrádrátturin kr. 6.000,- pr. barn. Niels Olaf Eyvindsson legði uppskot fram um at lækka skattaprosentið við 0,1%, men undirtøka var ikki fyri hesum. Fíggjarætlanin varð einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.35

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Magni Bertholdsen

Eyðfinn Debes Martin í Nesi Niels J. Thomsen Niels Olaf Eyvindsson